LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR
THE PARLIAMENT'S AUDIT COMMITTEE

*Argir, 25. november 2024*

Til Løgtingið

**Uppskot til samtyktar um at leggja frágreiðing fyri Løgtingið um Húsalánsgrunnin**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja frágreiðing fyri Løgtingið, sum viðger støðuna í Húsalánsgrunninum og hvørjar ætlanir eru við Húsalánsgrunninum. Herundir hvørjar ætlanir eru um at dagføra lógina um Húsalánsgrunnin.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

Sambært § 14, stk. 1, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." kunnu løgtingsgrannskoðararnir áleggja grannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, ið teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir heittu á Landsgrannskoðanina um at gera eina frágreiðing um Húsalánsgrunnin. Landsgrannskoðanin lat í mars 2024 løgtingsgrannskoðarunum hjáløgdu frágreiðing.

Í frágreiðingini er m.a. víst á:

- at lógarheimild er ikki at halda Húsalánsgrunnin uttan fyri fíggjarlóg og landsroknskap, soleiðis sum tað er gjørt,
- at Húsalánsgrunnurin hevur ikki strategiskar langtíðarætlanir at skipa sítt virksemi eftir,
- at Bústaðarpolitikkur landsins frá 2012 ásetir, at húsaleigan skal ásetast eftir veruliga kostnaðinum,
- at kostnaðargrundaða húsaleigan ger, at leigan fyri nýggjastu íbúðirnar er hægri enn fyri tær eldru,
- at Húsalánsgrunnurin grundar húsaleiguna á lánsafturgjald, rakstrarútreiðslur og grunsgjald, men hevur í summum førum lækkað grunsgjaldið fyri at fáa leigarar, og
- at Húsalánsgrunnurin hevur ikki virkað nóg væl sum eitt bústaðarpolitiskt amboð fyri alt landið, t.d. við at útvega leigubústaðir uttan fyri miðstaðarøkið.

Frágreiðingin frá Landsgrannskoðanini fekk løgtingsgrannskoðararnar at stúra fyri fíggjarliga haldførinum hjá Húsalánsgrunninum, og tí heittu teir m.a. á grannskoðaran hjá Húsalánsgrunninum um at gera eina frágreiðing, sum lýsir langtíðarhaldførið hjá Húsalánsgrunninum, herundir rakstrarætlan, fíggjarætlan og gjaldførisætlan fyri næstu 10 árini.

TRAÐAGØTA 43 . POSTRÚM 2053 . FO-165 ARGIR
TEL +298 35 51 00 . FAX +298 35 51 01
POSTUR@LG.FO . WWW.LG.FO

Í mai 2024 fingu løgtingsgrannskoðararnir frágreiðingina frá grannskoðaranum hjá Húsalánsgrunninum. Hendan frágreiðingin, saman við frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini, hevur sannført løgtingsgrannskoðararnar um, at avbjóðingar eru við langtíðarhaldførinum hjá Húsalánsgrunninum. T.d. er neyðugt at hækka leiguinntøkurnar, at minka bygnaðin, at selja burtur av ognunum og farast kann ikki undir nýggjar verkætlanir.

Løgtingsgrannskoðarunum kunnugt, er nýggja leiðslan farin undir átøk fyri at betra um haldførið hjá grunninum.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at skiftandi landsstýrisfólk ikki hava livað upp til sína eftirlitsskyldu við Húsalánsgrunninum, og mæla til at rætta upp á viðurskiftini, sum víst er á í frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini.

---

**Løgtingsgrannskoðararnir, 25. november 2024**

| | |
|---|---|
| Jóhannis Joensen, formaður | Erhard Joensen, næstformaður |
| Erling Eidesgaard | Jacob Vestergaard |

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Frágreiðing frá Landsgrannskoðanini um Húsalánsgrunnin
Fylgiskjal 2: Frágreiðing frá Januar